# Setrið á ferð: Almennur fyrilestur í Klaksvík

**Vælumtókti fyrilesturin um fólkanøvn og navnalóggávu kemur nú eisini til Klaksvíkar. Fyrilesturin hevur verið í Sandavági, Fuglafirði, Húsavík, Tórshavn og nú eisini í Klaksvík. Fyrilesturin verður á bókasavninum í Klaksvík týskvøldið 28. mars kl. 20.**

Í fyrilestrinum, sum hevur heiti "Føroysk fólkanøvn og føroysk navnalóggáva" verður greitt frá gongdini í føroyskari fólkanavnagávu, síðan fyrsta føroyska fólkanavnalógin kom í gildi í 1992. Við hagtølum verður m.a. greitt frá, hvussu nógv eita eittans fornavn, hvussu nógv eita tvey og hvussu nógv eita trý fornøvn – tað mest loyvda talið. Tey 10 mest nýttu mannfólka- og konufólkanøvnini verða sýnd. Eisini verður greitt frá millumnøvnum og eftirnøvnum. Men fyrst verður í stuttum greitt frá navnalógunum báðum, teirri frá 1992 og teirri frá 2002, og hvørjar danskar lógir vóru galdandi undan teirri fyrru. Við lógini frá 1992 varð aftur loyvt at nýta sum skrásett eftirnavn tann gamla hátt at nevna –son ella –dóttir faðirs síns ella móður. Hetta navnalag, sum er eldri enn søgur ganga frá, varð avtikið her í Føroyum um somu tíð sum í Danmørk, t.e. við kongligari dópsfyriskipan frá 1828 – hon varð sett í gildi í Føroyum fýra ár seinni, í 1832. Har stendur í seinastu grein, at børn skulu verða doypt við tí "Stamnavni", t.e. ættarnavni, sum tey skulu bera hereftir. Eins og í Danmørk komu vanligastu nøvnini at vera faðirsnavnið hjá pápanum, sum endaði við –sen. Sagt verður frá, hvussu nógv hava tikið undir við hesum nýggja gamla møguleika. Nomið verður eisini við eftirnøvn í sambandi við giftu, t.e. hvussu nógv hjún varðveita egna eftirnavn sítt eftir vígslu ella hvussu nógv taka eftirnavnið hjá hinum hjúnafelagnum eftir vígslu.

Anfinnur Johansen er lektari í málfrøði. Hann er útbúgvin mag.art í norrønari málfrøði frá Universitetinum í Keypmannahavn. Anfinnur hevur verið formaður í navnanevndini seinastu nógvu árini

Fyrilesturin er sjey og fjørutiundi í røðini Setrið á ferð. Røðin verður skipað í samstarvi millum Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Fróðskaparfelag og kunningarstovurnar í Suðuroy, á Sandi, í Vágum, í Fuglafirði og mentanardeildini á Klaksvíkar Býráð.

# Spennandi fyrilesturverður í Miðlahúsinum

Í kjalarvørrinum av kjakinum um Muhammed tekningarnar, verður ein viðkomandi fyrilestur í Miðlahúsinum í kvøld klokkan 19.30. Danin Børge Schantz er prestur og trúboðari. Hann kemur til Føroya at halda fyrilestur um viðurskiftini millum vesturheimin og arabiska heimin.

Tað er Adventskirkjan sum skipar fyri tiltakinum.

Talan er um eina røð uppá fýra fyrilestrar, og tann fyrsti verður so í kvøld í Miðlahúsinum. Børge Schantz fer at m.a. at umrøða profetin Muhammed, truplu samveruna millum kristin og muslimar, og kreppustøður sum ikki slepst undan. Eitt nú verða tær nógv umrøddu Muhammed tekningarnar í Jyllands Posten umrøddar.

"Okkara kristna grundstøði í tí trúarligu avbjóðing, sum er komin av Muhammed tekningunum, hevur eftir mínum tykki ikki fingið tað rúm, sum tað átti í hesum kjaki", sigur Børge Schantz millum annað í vikuskiftis Sosialinum.

Í fyrsta fyrilestrinum verður evnið profeturin Muhammed. Børge Schantz fer her m.a. at røða um samtíð, lív og hjúnalagið hjá Muhammed.

Tiltakið er ókeypis.




*Jens Wilhelm Danielsen Børge Schantz*

# Høgni á øðrum plássi

Ongin ivi er um, at Høgni Lisberg er vælumtóktur í føroyska tónleikaheiminum. Seinastu 5 vikurnar hevur Høgni Lisberg ligið á ovastu rók á 15 teimum bestu. Men hesa vikuna var tað amerikanska songkvinnan Pink sum skumpaði Høgna til viks. "Learn To Ride On Waves" datt oman á 2 pláss á listanum, og hetta má sigast at vera spell, tí Høgni hevur ligið á listanum í 15 vikur, og tískil dettur hann nú úr listanum. Sostatt endaði "Learn To Ride On Waves" sína herjan á einum 2. plássi í 15 teimum bestu.

Næstovasti føroyingurin er Petur Pólson. Huldukenda lagið "Fremmandur" datt eitt pláss niður á 3. plássið. Fløguaktuelli Makrel fóru eisini bóltandi oman eftir listan. Við lagnum "Filthy Tongue" hava teir førka seg frá einum 4. plássið til eitt 6. pláss.

Hóast "Learn To Ride On Waves" ikki longur verður at finna á listanum, so kunnu áhoyrararnir hjá Høgna ugga seg við, at hann nú hevur fingið eitt nýtt lag inn á listan. Talan er um væl svingandi lagið "Just Dig" sum kom beinleiðis inn á eitt 7. pláss.

Á 12. plássið finna vit góðu gomlu Villmenn. Vit teirra "Cyperspace" klatraðu teir tvey pláss upp eftir listanum. Og á 14. plássið eru okkara egnu poppstjørnur úr Poppkorn at finna. Droymi Mitt Um Dagin er dottin trý pláss niðureftir listanum.

Spennandi verður at vita hvussu fer at gangast í næstu viku. Bara eitt føroyskt eykalag er hesa vikuna, og tað er H71 sangurin.

**15 tær bestu**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 5 | 7 | 1 | 6 | Pink / Stupid Girls |
| 2 | 1 | 1 | 1 | 15 | Høgni Lisberg / Learn To Ride On... |
| 3 | 2 | 3 | 2 | 4 | Petur Pólson / Fremmandur |
| 4 | 6 | 2 | 2 | 12 | Kelly Clarkson / Because of You |
| 5 | 3 | 6 | 3 | 14 | Robbie Williams / Advertising Space |
| 6 | 4 | 5 | 4 | 3 | Makrel / Filthy Tongue |
| 7 | (e) | - | 7 | 1 | Høgni Lisberg / Just Dig |
| 8 | 9 | 9 | 8 | 5 | Kent / Dom som försvann |
| 9 | 10 | 13 | 9 | 7 | The Pussycat Dolls / Beep |
| 10 | 7 | 11 | 7 | 4 | Black Eyed Peas / Pump It |
| 11 | 8 | 10 | 8 | 6 | Madonna / Sorry |
| 12 | 14 | (e) | 12 | 2 | Villmenn / Cyperspace |
| 13 | (e) | - | 13 | 1 | Pearl Jam / World Wide Suicide |
| 14 | 11 | 8 | 8 | 9 | Poppkorn / Droymi Mitt Um Dagin |
| 15 | (e) | - | 15 | 1 | Joey Moe / My Last Serenade (e) - - - - |

Big City Rock / All Of The Above (e) - - - -
Karmah / Just Be Good To Me (e) - - - -
LL Cool J feat. Jennifer Lopez /... (e) - - - -
Bob Sinclar / Love Generation (e) - - - -
H71 Sangurin /

## Navnleysur á fløgu




TÍÐINDASKRIV
*Rókur Jákupsson Jakobsen rokur@ sosialurin.fo*

Í dag kemur nýggj fløga út í sølubúðirnar. Hans Jacob K. Mouritsen gevur út fløguna "Navnleysur", og talan er um popp/kontri tónleik av tí góða, gamla slagnum. Hans Jacob eigur sjálvur orð og løg á fløguni sum rúmar 6 føroysk løg.

Luttakandi tónleikarar á fløguni eru:
Hjalmar Joensen – Samkór
Jóan Petur Jensen – Samkór/røddir
Eyðna Mellemgaard – Røddir
Jan Petersen – El, slide og kassagittarar
Axel Eysturstein – Tangentar
Ian Ongamar – Tangengar, kassagittarar
Og Hans Jacob K. Mouritsen – Forsangur, samkór

Ian Onghamar hevur upptikið og framleitt útgávuna, og Axel Eysturstein hevur framleitt húsan.

## Guðrun Sólja live í Áarstovu

Guðrun Sólja Jacobsen og guitarleikari hennara, Henrik Nielsen, fara á pall í Århus 22. apríl.

Í eina tíð hevur Guðrun Sólja Jacobsen havt fastan guitarleikara, danan Henrik Nielsen. Tann 22. apríl fara tey bæði á pall í Áarstovu, ið er stað hjá føroyskum útisetum í Århus.

Guðrun hevur, umframt at syngja ymsastaðni, eisini arbeitt við at skriva nýggj løg. Guðrun og Henrik vitjaðu í Føroyum um jóltíðir og framførdu tá eisini saman.